# Býráðið

**Dagfesting:** 13.11.2023 kl. 19:00
**Málnr.:** 22/00084

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Gudny Vang, Ólavur Larsen

Varalimir: Bergtóra Cederiusdóttir fyri Sonna á Horni, Kristian Martin Petersen fyri Magna Jøkladal

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 36/23 | 23/00246-16 | Innkalling av Bergtóru Cederiusdóttir og Kristian Martin Petersen til býráðsfundin 13. november 2023 |
| 37/23 | 23/00168-3 | Flogfenahald reglugerð |
| 38/23 | 21/00347-45 | Broyting av byggisamtykt við Gjógvaráveg |
| 39/23 | 23/00459-1 | Navngeving av niðaravegi |
| 40/23 | 23/00524-1 | Eykajáttan 2023 |
| 41/23 | 23/00538-1 | Málslýsing FÆ2024 |
| **Til kunning** | | |
| | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Til støðutakan**

## 36/23
## 23/00246-16 Innkalling av Bergtóru Cederiusdóttir og Kristian Martin Petersen til býráðsfundin 13. november 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 13.11.2023 | 36/23 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Sonni á Horni og Magni Jøkladal hava forfall til býráðsfundin 13. november 2023 kl. 19. Hesir býráðslimir ynskja allir, at varalimir skulu kallast inn sambært § 18, stk. 1. í kommunustýrislógini.<br><br>Fjórðvalda á lista Á Lillian Jacosen hevur boðað frá at hon metir seg vera ógegniga at luttaka á býráðsfundi 13. november 2023, tí hon sum leiðari á teknisku deild stendur aftan fyri fleiri mál sum eru á skrá. Næst á lista Á er Bergtóra Cederiusdóttir. Kristian Martin Petersen er fjórðvaldur á lista B við 46 atkvøðum, í samband við kommunuvalið 10. november 2020.<br><br>Býráðið skal – samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini – fyrst á fundinum 13. november 2023 gera av um treytirnar fyri inkalling av tiltakslimunum Bergtóru Cederiusdóttir Og Kristian Martin Petersen eru loknar samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir til, at Bergtóra Cederiusdóttir tekur sæti fyri Sonna á Horni og Kristian Martin Petersen tekur sæti fyri Magna Jøkladal í Fuglafjarðar býráð í sambandi við fundin 13. november 2023. | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| Dagf | 9. november 2023 |
|---|---|

**Býráðið 13. november 2023:**
Býráðið tekur undir við tilmælinum frá borgarstjóranum um, at Kristian Martin Petersen og Berrgtóra Cederiusdóttir taka sæti á fundinum 13. november 2023.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 37/23
## 23/00168-3 Flogfenahald reglugerð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Orku- og umhvørvisnevndin | 11.04.2023 | 1/23 |
| 2 Býráðið | 27.04.2023 | 11/23 |
| 3 Býráðið | 13.11.2023 | 37/23 |

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Nevnd/ir | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Umhvørvisstovan hevur sent skriv út um at mælt verður til at kommunur í Føroyum seta reglur um flogfenaðhald í gildi. Endamálið við reglugerðunum er m.a. at fyribyrgja, at flogfenaður er til ampa fyri fólk í grannalagnum og at fyribyrgja rottu í nærumhvørvinum.<br><br>Reglugerðin ásetur m.a. treytir fyri hús, búr, girðingar og tílíkt. Eisini eru krøv um, hvussu fóður skal goymast og gevast fyri at fyribyrgja, at flogfenaðhald dregur rottu at sær.<br><br>Reglugerðin kann gerast sambært § 23 í kunngerð um umhvørvisreglur, og skal góðkennast av Umhvørvisstovuni.<br><br>**Ískoyti, 27.10.2023**<br>Broytingar í reglugerðini til góðkenningar, samb. góðkenningarskriv frá Umhvørvisstovuni dagf. 18.10.2023, um at sletta reglu um revsing, tó er sama avleiðing í §5 | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Umhvørvisstovan hevur sent skriv út um at mælt verður til at kommunur í Føroyum seta reglur um flogfenaðhald í gildi. | | |
| Grundarlag | • § 23 í kunngerð um umhvørvisreglur<br>• Reglugerð - uppskot | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | nei | Nei |
| | Umsitingarligar | nei | nei |
| Tilmæli | Tekniski leiðari mælir orku- og umhvørvisnevndina til at góðkenna reglugerðina um flogfenaðhald í Fuglafjarðar kommunu | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | **Ískoyti til tilmæli 27.10.2023**<br>Tekniski leiðari mælir býráðnum til at góðkenna endaligu reglugerðina og at hon fer í gildið 01.12.2023 |
| Dagf | 23.03.2023<br>18.10.2023 |

**Orku- og umhvørvisnevndin 11. apríl 2023:**
Orku- og umhvørvisnevndin mælir einmælt býráðnum til at fylgja tilmælinum frá tekniska leiðara

**Býráðið 27. april 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við, at seta reglugerðina fyri flogfenað hald í gildi í Fuglafjarðar kommunu.

**Býráðið 13. november 2023:**
Býráðið tekur einmælt undir við tilmælinum frá tekniska leiðaranum og góðkennir endiliga reglugerðina um flogfena at koma í gildi 1. desember 2023.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 38/23
## 21/00347-45 Broyting av byggisamtykt við Gjógvaráveg

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.10.2023 | 50/23 |
| 2 Býráðið | 13.11.2023 | 38/23 |

### Tilráðing

<table>
<tr><td>Til viðgerðar í</td><td colspan="3">Tekniska nevnd</td></tr>
<tr><td>Stutt lýsing av málinum</td><td colspan="3">Á parti av økinum millum Gjógvaráveg og sandin, er ikki samsvar millum verandi bygging og byggisamtykt. Sethúsini í økinum standa á matr.nr. 697, 698, 699, 700 og 706, og vóru øll hesi longu bygd tá verandi byggisamtykt galdandi fyru økið var samtykt.<br>Fyri at rudda upp í hesum, verður mælt til at broyta byggisamtyktina fyri økið so matr.nr. 697, 698, 699, 700 og 622a verður broytt frá at verða Miðstaðarøki A, til at verða Íbúðarøki B.<br>Eisini verður byggisamtyktin broytt fyri matr.nr. 701, 702, 703, 704, 705 og 706, frá at verða Frílendi I til at verða Íbúarøki B.<br>Fjøruluturin, matr.nr. 882a, sum er millum omanfyri nevndu matriklar, verður broyttur frá at verða Miðstaðarøki A til at verða Frílendi I.<br><br><u>Viðmerking:</u><br>Kristian Martin Petersen metir seg ógegnigan í málinum og fór av fundinum meðan málið varð vigjørt 13. november 2023.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Málið verður viðgjørt av nýggjum eftirsum vit ikki fáa broytt ein lítlan part av økinum. Tí verður málið broytt soleiðis at alt økið har sethús standa broytt til íbúðarøki.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Tekniski leiðarin mælir til at byggisamtyktin verður broytt sambært uppskoti.</td></tr>
</table>

| | |
|---|---|
| | Á fundinum 13. november 2023 mælir Gudny Vang, at beina málið aftur í teknisku nevnd fyri at gera eina serstaka byggisamtykt, áðrenn endalig støða verður tikin til málið. |
| Dagf | 9.10.2023 |

**Tekniska nevnd 12. oktober 2023:**
Tekniska nevnd mælir einmælt býráðnum til at fylgja tilmælinum frá tekniska leiðara

**Býráðið 13. november 2023:**
Býráðið atkvøddi fyrst um broytingaruppskotið frá Gudny Vang um at beina málið aftur í nevnd. Uppskotið fall við 2 atkvøðum fyri og 6 atkvøðum ímóti. Gudny Vang og Ólavur Larsen atkvøddu fyri.

Býráðið atkvøddi síðani um uppskotið frá teknisku nevnd. Uppskotið varð samtyk við 6 atkvøðum fyri 1 ímóti og 1 blankari. Gudny Vang atkvøddi ímóti og Ólavur Larsen atkvøddi blankt.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**39/23**
**23/00459-1 Navngeving av niðaravegi**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 19.09.2023 | 1/23 |
| 2 Tekniska nevnd | 12.10.2023 | 47/23 |
| 3 Býráðið | 13.11.2023 | 39/23 |

**Tilráðing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Gøtunavnanevndin, tekniska nevnd | | |
| Stutt lýsing av málinum | Niðarivegur hevur í dag 4 ymisk nøvn: Mørkin, Karvatoftir, Í Støð og Bakkavegur. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Formaðurin í gøtunavnanevndini | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Umrøðast og finnast hóskandi navn/ nøvn til niðara veg.<br><br>Á fundinum 13. november 2023 mælti formaðurin í teknisku nevnd, at beina málið aftur í teknisku nevnd, sum tekur málið upp aftur við gøtunavnanevndina fyri, at fáa málið betur upplýst áðrenn endalig støða verður tikin. | | |
| Dagf | 19.09.2023 | | |



**Gøtunavnanevndin 19. september 2023:**
Uppskot er frá gøtunavnanevndini um at broyta gøtunøvnini frá Gjónni til Tróndarbrekku til ***Niðarivegur***. Og frá Tróndarbrekku og heilt til Vónina fyri ***Við Havnalagið.*** Og so fáa skeltir

upp við teksti har staðarnøvnini Mørkin, Karvatoftir og í Støð er. Annars viðmerkti nevndin at skelting í bygdini manglar.

**Tekniska nevnd 12. oktober 2023:**
Tekniska nevnd tekur undir við uppskotinum um at broyta veganøvnini til Niðarivegur fram til Tróndarbrekku. Tó heldur nevndin at vegurin framhaldandi skal eita Bakkavegur frá Tróndarbrekku og heilt (norður) til Vónina.

**Býráðið 13. november 2023:**
Atkvøtt varð fyrst um uppskotið frá formanninum í teknisku nevnd um, at beina málið aftur í teknisku nevnd. Býráðið tók einmælt undir við hesum uppskoti.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**40/23**
**23/00524-1 Eykajáttan**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 02.11.2023 | 42/23 |
| 2 Býráðið | 13.11.2023 | 40/23 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevnd og býráð |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Leiðslubólkurin í Fuglafjarðar kommunu hevur gjøgnumgingið og viðgjørt tey einstaku rakstrarstøðini og er komin framm til, at íalt er neyðugt við umraðfestingum á DKK 4.680.000. Talan er í summum førum um staðfesta meirnýtlsu, og í øðrum førum er talan um væntaða meirnýtslu. Hetta er galdandi fyri øll økir í kommununi, undantikið økið 1. Fígging er somuleiðis funnin á øllum økjum, undantikið á økið 1. Sostatt er umraðfestingin útreiðsluneutral. Orsøkirnar til meirnýtsluna eru ymiskar fyri tey einstaku rakstrarstøðini og eru lýstar í hjálagda skjalið. |

| RS | | Væntað meirnýtsla |
|---|---|---|
| 230 | Kommunal tannrøkt | 400.000 |
| 231 | Íløgur tannrøkt | 180.000 |
| 250 | Barnavernd | 600.000 |
| 264 | Doktarahúsini | 100.000 |
| 320 | Kambur húsaútreiðslur | 170.000 |
| 410 | Fólkaskúlin | 300.000 |
| 536 | Mentanarvikan | 120.000 |
| 570 | Fótbóltsvøllurin | 100.000 |
| 571 | Fótbóltsvøllurin íløgur | 100.000 |
| 650 | Vatnveiting | 1.000.000 |
| 670 | Vegir | 700.000 |
| 672 | Reinhald, kavarudding | 50.000 |
| 690 | Bilar, maskinur | 250.000 |
| 740 | Moldgoymsla | 150.000 |
| 751 | Fuglafjarðar havn íløgur | 460.000 |
| Meirnýtsla í alt | | 4.680.000 |

<table>
<tr><td></td><td>Til tess at fíggja staðfestu og væntaðu meirnýtsluna, hevur okkara gjøgnumgongd víst, at tað er gjørligt at flyta játtan frá hesum rakstrarstøðum:

<table>
<tr><th>RS</th><th></th><th>Fígging av meirnýtslu</th></tr>
<tr><td>220</td><td>Kommunulæknin</td><td>-100.000</td></tr>
<tr><td>250</td><td>Barnavernd</td><td>-350.000</td></tr>
<tr><td>290</td><td>Ymiskur stuðul</td><td>-130.000</td></tr>
<tr><td>414</td><td>Undirvísingartilfar</td><td>-200.000</td></tr>
<tr><td>430</td><td>64 Skúlin</td><td>-1.000.000</td></tr>
<tr><td>532</td><td>Kunning um kommununa</td><td>-200.000</td></tr>
<tr><td>534</td><td>Ymisk mentanartiltøk</td><td>-100.000</td></tr>
<tr><td>542</td><td>Fuglafjarðar bókasavn</td><td>-100.000</td></tr>
<tr><td>564</td><td>Piddasahandil</td><td>-100.000</td></tr>
<tr><td>632</td><td>Kommunal útstykking</td><td>-500.000</td></tr>
<tr><td>651</td><td>Vatnveiting íløgur</td><td>-450.000</td></tr>
<tr><td>671</td><td>Vegir íløgur</td><td>-100.000</td></tr>
<tr><td>673</td><td>Gongubreyt Kambsdal</td><td>-200.000</td></tr>
<tr><td>750</td><td>Fuglafjarðar havn</td><td>-1.000.000</td></tr>
<tr><td>792</td><td>Kunningarstovan</td><td>-150.000</td></tr>
<tr><td>Íalt</td><td></td><td>-4.680.000</td></tr>
</table>
</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td>Sambært kommunu stýrislógini §38 skal fíggjarnevndin ummæla uppskot til eykajáttan, sum skal leggjast fyri býráðið og sambært § 41 krevur eykajáttanin tvær góðkenningar frá kommunustýrinum við í minsta lagi 14 daga millumbilum.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td>• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt Kommunustýrislógin og Kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu</td></tr>
</table>

11

| | | | |
|---|---|---|---|
| | • Møgulig fylgiskjøl<br>Útgreining av meirnýtslu til eykajáttan heyst 2023.docx<br>Uppskot til flytingar. xlsx | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Eykajáttanarumbønin omanfyri er tilsamans DKKM 4.680 og er peningur funnin innanfyri verandi karmar. Mælt verður til, at fíggjarnevndin viðger umbønina og síðani mælir býraðnum til at gera omanfyri nevndu umraðfestingar, alternativt, at gera umraðfestingar í mun til verandi fíggjarætlan. | | |
| Dagf | 02. november 2023 | | |

**<u>Fíggjarnevndin 02. november 2023:</u>**
Fíggjarnevndin tekur undir við útreiðsluneutralu eykajáttanini uppá 4.680 tkr. og mælir býráðnum til at samtykkja hesa eykajáttan. 12

**<u>Býráðið 13. november 2023:</u>**
Býráðið tók einmælt undir við eykajáttanaruppskotinum og beinir tað víðari til 2. viðgerð.

**41/23**
**23/00538-1 Málslýsing FÆ2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.11.2023 | 47/23 |
| 2 Býráðið | 13.11.2023 | 41/23 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Karmarnir til fíggjarætlanina hjá Fuglafjarðar kommunu fyri fíggjarárið 2024 blivu viðgjørdir og samtyktir í fíggjarnevnd býráðsins 25.september 2023 og í býráðnum 28.september. Umsitingin hevur síðani arbeitt við málinum.<br>Eitt samlað býráð hevur arbeitt víðari á arbeiðsfundum í døgunum 30-31 oktober 2023, eins og nevndarviðgerðir hava verið í tíðarskeiðnum 1.november til 13.november 2023.<br><br>Samanumtikið er høvuðsinnihaldið í fíggjarætlanaruppskotinum fyri 2024 soljóðandi:<br>Fíggjarætlanin javnvigar við kr. 146.908.808,- og er fíggjað við kr. 113.353.811 í skatta- og avgjaldsinntøkum, Rakstrarinntøkum á kr. 33.554.997 og við kr.11.474.449 í innistandandi peningi.<br><br>Inntøkurnar av A og B skatti eru mettar til kr. 77.314.811,- ið er kr.5.683.449 lægri enn nettorakstrarútreiðslan á kr. 82.998.260 Miðal vøksturin í rakstrinum er 5% í mun til fíggjarætlanina í fjør. Partafelagsskatturin er mettur til kr. 15.000.000,- ið er kr. 1.500.000 hægri enn metingin fyri fíggjarárið 2023.<br><br>Bæði samtykt og ávegis uppskot frá Føroya Løgtingi, økja um óvissuna av metingina av partafelagsskattinum komandi ár. Flytingar frá landinum í mun til kapitaleftirlønir, DIS og FAS verða mettar til kr. 20.989.000, í mun til DKM 18,7 í 2023. Íroknað hækkingina er nýggj flyting frá landinum – mett tøku- og veiðugjøld á kr. 920.000.<br><br>Rakstrarkostnaðurin av eldrasamstarvinum Nánd verður mettur til kr. 25.182.461, ið er áleið kr. 850.000 hægri enn mett í fjørð.<br><br>Nettoíløgurnar verða mettar til kr. 31.030.000<br>Íløgurnar eru á øllum økjum. Dentur er lagdur á skúlabygging, umhvørvisøkið, eins og neyðugar íløgur á tekniska økinum eru raðfestar. Somuleiðis eru neyðugar íløgur raðfestar á vinnuøkinum. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Stoð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | Neyðugt verður møguliga, at lánifíggja partar av íløgunum, hóast hækkandi rentustøði viðførir hækkandi rentuútreiðslur og lækkandi lánsavdráttir.<br>Rentuútreiðslurnar økjast DKM 1,5 meðan avdráttirnir lække við kr. 700.000<br>Skattaprosentið er 21,25 og barnafrádrátturin er hækkaður 500 kr. fyri hvørt barn til 8.000 kr. fyri hvørt barni. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | §39 í kommunustýrislógini er soljóðandi:<br><br>***§ 39.*** *Fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.*<br>*Stk. 2. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.*<br>Í somu lóggávu er staðfest í §53 stk.2,nr.2 at:<br>***§ 53, stk. 2, nr. 2*** *Til tess at landsstýrismaðurin kann røkja sínar eftirlitsskyldur við fíggjarligu viðurskiftinum hjá kommununum, skulu tær lata honum:*<br><br>*2) samtykta fíggjarætlan innan 3 gerandisdagar eftir 1. desember* |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>§§ 39 og 53, stk. 2, nr. 2 í kommunustýrislógini<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>Fíggjarætlan útgreinað til 1. viðgerð<br>Viðmerkingar til FÆ2024 samlað |

**Viðgerð**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | ja |

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Mælt verður til at Fíggjarnevndin viðgerð uppskotið til Fíggjarætlanina, og ger tilmæli til býráðið um at samtykkja uppskotið við 1. viðgerð 13. november 2023. |
| Dagf | 12. november 2023 |

14

**Fíggjarnevndin 13. november 2023:**
Fíggjarnevndin tekur undir við uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2024 og mælir býráðnum, at samtykkja hesa við 1. viðgerð 13. november 2023.

**Býráðið 13. november 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við fíggjarætlanini til 1. viðgerð og beinir málið víðari til 2. viðgerð.

Fundurin lokin kl. 21.00

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

David Andreasen

Edva Jacobsen

Eivin Breiðaskarð

Gudny Vang

Ólavur Larsen

Kristian Martin Petersen

Bergtóra Cederiusdóttir

16